umhvørvisstovan

# Umhvørvisgóðkenning

sambært kapittul 5 í løgtingslóg nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **P/F Marine Harvest** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Laxá, Ternubrekkan 3, 695 Hellurnar | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| Framleiðsla av smolti | |
| Aliloyvi.: | Staður: |
| | Hellurnar |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 12/00256 | 16.10.2017 |

Umhvørvisstovan, tann 16.10.2017

Suni Petersen, deildarleiðari / Vivie Kirke Davidsen, umhvørvisviðgeri

# 1. Góðkenning og heimildir

Henda umhvørvisgóðkenning av smoltstøðini hjá Marine Harvest, matr. nr. 869b og a á Hellunum, er givin við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Henda góðkenning er givin til P/F Marine Harvest, sum skal lúka tær treytir, sum eru nevndar í 4. parti, góðkenningartreytir. Treytirnar eru galdandi fyri alt virksemi, sum er knýtt at smoltstøðini.
Í sambandi við nevndu treytir, eru nevnd ymisk tiltøk, sum skulu gerast av felagnum, fyri at tryggja, at umhvørvið verður ávirkað so lítið sum gjørligt av virkseminum henda góðkenning fevnir um.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampum, sum kunnu standast av virkseminum.
Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning ella loyvi eftir aðrari lóggávu.

# 2. Umsókn

Umhvørvisstovan fekk tann 09. desember 2016 umsókn um umhvørvisgóðkenning av smoltstøðini hjá P/F Marine Harvest á Hellunum (12/00256). Talan er um virksemi, sum er í bygningum á matr. nr. 869b og 869a.
Saman við umsóknini eru móttikin kloakkplanur, byggiloyvi, tekning yvir økisnýtslu, loyvi frá náttúrufriðingarnevnd og loyvi frá yvirfriðingarnevndini.

# 3. Viðgerð

Undir viðgerðini av umsóknini og í sambandi við at áseta treytir er m.a. hetta tilfar nýtt:

- Umsókn um umhvørvisgóðkenning við dagføringum
- Norðurlendsk BAT-frágreiðing um aling: *BAT for fiskeopdræt i norden*[1]

## 3.1 Málsviðgerð

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á,

- at skarn og fóðurrestir ikki verða leidd út,
- at P/F Marine Harvest hevur vælvirkandi innaneftirlit, umhvørvisstýriskipan og skrásetingar,
- at virkið áhaldandi arbeiðir fyri at skifta evni, ið verða brúkt í sambandi við virksemið, út við meira umhvørvisvinarlig evni,
- at umhvørvisdálkandi evni í minst møguligan mun verða leidd út í umhvørvið,
- at virkið skal avmarka dálking mest møguligt við at nýta best tøku tøknina (BAT[2]),

---

[1] BAT for fiskeopdræt i Norden, publikationsdato 25. april 2013.

[2] **Best Available Techniques.** Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum,

- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær ella at fiskur sleppur, skal minkast mest møguligt.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent P/F Marine Harvest, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, kommunu og kommunu til viðmerkingar.

# 4. Lýsing av virkseminum

Umhvørvisgókenningin umfatar alt virksemið sum er knýtt at smoltstøðini.
Smoltstøðin er matr. nr. 869 a og 869b á Hellunum í Fuglafjarðar kommunu. Sambært byggisamtykt er hetta øki K. Øki K verður nýtt til landbúnað og fiskaalistøðir o.a.
Øll framleiðsla er innandura á staðnum inntil smoltini verða sett út. Rogn verður keypt úr útlandinum til smoltstøðina.

Virkið er djórhald og er í bólki J.4, sum er fiskaaling í fylgiskjali til løgtingslóg um umhvørvisvernd. Hesi virki eru fevnd av kapittul 5 í lógini, og skulu tí hava umhvørvisgóðkenning.
Virksemið sum fer fram á virkinum er aling av smolti.

Virksemið hevur fimm hallir, A, B C, D og E og fevnir um alt virksemi frá at rognini verða løgd inn við umleið 400 døgngradir, og til smoltið verður sett út við eini støðd á áleið 600 gr.
Virksemið fevnir sostatt um rognarøkt, kleking, startfóðring og smoltifisering.
Samlaði tørvurin á nýggjum vatni er 172m$^3$/t. Sostatt er spillivatnsnøgdin pr. tíma í mesta lagi 172m$^3$/t, og til tíðir lægri tá kør standa tóm. Í framleiðsluni verða nýttir uml. 12.600 m$^3$/t av vatni, harav uml. 99% er resirkulerað vatn.
Framleiðslunøgdin er umleið 3 mió. smolt um árið. Rognini verða løgd inn í tveimum til trimum umførum, vanliga í apríl og november. Væntandi verður fóðurnýtslan framyvir 1.600 tons um árið.

Mannagongd fyri reinsing av vatninum sum verður resirkulerað er skjalfest í innaneftirlitsskipanini í SP.10.8.1. Í stuttum verður CO2 luftað úr vatninum og lútur verður tilsettur fyri at regulera pH í vatninum. Lufting av vatninum er mekanisk, pH verður regulerað við kaustiskari sodu ella kálki. Hallirnar hava hvør sína vatnreinsiskipan, sum passa til framleiðsluna í høllini. Nøgdin av stálsettum lúti er áleið 10-15% av nøgdini av fóðrinum. Framyvir er ætlanin at fáa kaustiska sodu heilt úr framleiðsluni. Í verandi støðu verður kaustisk soda bert brúkt í Høll C.

# 5. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

## 5.1 Útlát til luft og vatn

Á flest øllum smoltstøðum í Føroyum hevur skarn og fóðurspill verið leitt beinleiðis á sjógv. Talan hevur verið um smáar nøgdir av skarni og fóðri og tí hevur hetta ikki verið ein trupulleiki sum hevur elvt til upphópan.

---

avmarking av burturkasti, endurnýstlu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

Talan er nú um eina smoltstøð sum skal framleiða nógv størri smolt enn vanligt hevur verið í Føroyum, og tí verður eisini talan um nógv størri útlát av lívfrøðiligum evnum. Smoltstøðin liggur á Hellunum, har tað inntil víðari ikki hevur verið staðfestir stórir trupulleikar av upphópan.

Sambært spillivatnskunngerð skal spillivatn leiðast á sjógv har rákið førir spillivatnið úr landið og har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at tað ikki elvir til nakra upphópan av tilfari, til slóðir í sjónum ella aðrar broytingar í umhvørvinum.
Ætlanin er, at spillivatnið verður leitt beinleiðis á sjógv, men vísir hetta seg at geva trupulleikar, kann krav verða sett um at finna aðra loysn.
Fyri at minka um útlatið frá fóðurspilli, skal atlit takast til fóðurfaktor og miðjast ímóti at hava hendan so lágan sum møguligt.
Treyt verður sett um, at tá avgerð er tikin um hvat skal gerast við spillivatnið, skal Marine Harvest Harvest senda Umhvørvisstovnuni eina frágreiðing har greitt verður frá hvør loysn er funnin.

## 5.2 Burturkast

Alt burturkast skal skiljast og goymast í hóskandi íløtum, áðrenn tað verður latið góðkendum móttakara.

## 5.3 Innaneftirlit og umhvørvisstýring

P/F Marine Harvest skal hava eina umhvørvisstýrsskipan, sum m.a. fevnir um niðurskrivaðar mannagongdir, sum vísir hvørji mál virkið hevur sett fyri at gera ávirkanina á umhvørvi so lítla sum møguligt.

## 5.4 Yvirlit yvir ásettar freistir í treytunum sum eru settar í parti 5.

| Tiltak | Freist | Ávísing til treyt |
|---|---|---|
| Frágreiðing um staðseting av útleiðing | Áðrenn virksemið byrjar | 6.3.1 |
| Útleiðing gjørd | Áðrenn virksemið byrjar | 6.3.2 |
| Umhvørvisstyrisskipan við málum og niðurskrivaðum manngongdum | Áðrenn virksemið byrjar | 6.4.2 |
| Botnkanning har útleiðingin verður gjørd | Áðrenn virksemið byrjar | 6.3.3 |
| Rakstrarskrásetingar | 1. apríl á hvørjum árið | 6.4.5 |
| Kanningar av spillivatn | | 6.3.5 |

# 6. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við hesum treytum:

## 6.1 Almennar treytir

6.1.1 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

6.1.2 Henda umhvørvisgóðkenning er galdandi fyri virksemi sum er knýtt at smoltstøðini.

6.1.3 Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir um útlát ella vanda fyri útláti, fyrr enn góðkenning er fingin til hesa víðkan ella broyting.

6.1.4 Allar sýnistøkur, kanningar v.m. sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.1.5 Allar sýnistøkur, kanningar, metingar av úrslitum og metingar annars verða goldnar av P/F Marine Harvest.

6.1.6 Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

6.1.7 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kann bert verða givið boð ella forboð, um so er at:

- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast tá góðkenningin varð givin,
- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin,
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

6.1.8 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 6.2 Virksemi

6.2.1 Virksemið skal vera sum ávíst í umsóknini og tilfar sum er sent seinni.

6.2.2 Mest loyvda framleiðsla sambært hesi góðkenning er 3 mió. smolt á 600 g. Svarandi til eina fóðunýtsla á 1.600 tons árliga.

6.2.3 P/F Marine Harvest skal halda øll útlát so lág sum gjørligt.

6.2.4 P/F Marine Harvest skal avmarka útlát frá virkseminum mest møguligt við at nýta best tøku tøknina (BAT).

6.2.5 Goymslur til útgerð, burturkast o.a. skal tryggjast soleiðis, at tað ikki fýkur, elvir til ampar ella er atvold til dálking í náttúruni.

6.2.6 Hølir, ið nýtt verða til goymslu av kemikalium o.ø., skulu hava tætt undirlag.

## 6.3 Útlát á sjógv

6.3.1 P/F Marine Harvest skal brúka best tøku tøknina, BAT, fyri at minka um útlát og fyri, at t.d. skarn og fóðurspill kann verða gagnnýtt aðrastaðni.

6.3.2 Áðrenn virksemið kann fara ígongd skal P/F Marine Harvest senda Umhvørvisstovuni eina frágreiðing um hvat ætlanin er at gera við skarn og fóðurspill.

6.3.3 P/F Marine Harvest skal senda Umhvørvisstovuni fráðgreiðing um útleiðing av spillivatni sum inniheldur:

- hvar útleiðingin er víst á korti, sum vísur dýpi, botnslag og botntopografi
- Frágreiðing um hví staðið er valt, saman við lýsing av streymviðurskiftunumm á staðnum

6.3.4 Áðrenn útleiðingin verður gjørd, skal ætlanin góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.3.5 Munnin á útleiðingini skal í minsta lagið verða ein metur undir størstu fjøru.

6.3.6 P/F Marine Harvest skal gera hóskandi kanning so sum við myndum, av botninum út fyri útleiðingina, áðrenn virksemi byrjar.

6.3.7 Kanningin skal gerast av streymviðurskiftum og botntopografi og sendast Umhvørvisstovuni til góðkenningar í minsta lagið 4 vikur áðrenn hon verður gjørd.

6.3.8 Eina ferð, 3. hvørt ár, skal kanning gerast aftur við útleiðingina. Um nøkur sjónlig broyting sæst, skal P/F Marina Harvest seta bøtandi atgerðir í verk.

6.3.9 Eftir at Umhvørvisstovan hevur móttikið úrslitini frá kanningini, saman við eini frágreiðing, verður støða tikin til, um neyðugt er við fleiri kanningum.

6.3 10 Elvir spillivatnsútleiðingin til uppsavnan av evnum ella tilfari í sjóvarmálanum ella á botni, til slóðir ella aðrar broytingar í umhvørvinum, skulu bøtandi atgerðir gerast.

6.3.11 Nýtslan av reingerðarevnum, sóttreinsingarevnum og evnum at forða gróðri, skal avmarkast mest møguligt, og miðjast skal altíð eftir at brúka umhvørvisvinaligastu evnini.

6.3.12 Umhvørvisstovan kann krevja, at P/F Marine Harvest ger kanningar av spillivatninum.

## 6.4 Útlát til luft

6.4.1 Virksemið má ikki hava við sær ampar av lukti, dusti ella royki uttan fyri øki hjá smoltstøðini.

6.4.2 Um ampar verða av lukti, dusti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

6.4.3 Allar útleiðingar til luft skulu skulu leiðast uppeftir og í minsta lagi ein metur yvir tak.

## 6.5 Umhvørvisstýring

6.5.1 P/F Marine Harvest skal hava ein umhvørvisstýrisskipan, sum er samsvarandi viðurkendum skipanum.

6.5.2 Niðurskrivaðar mannagongdir skulu lýsa umhvørvismál fyri hvussu P/F Marine Harvest kann minka um ávirkanina á umhvørvið og hvussu tey kunnu røkkast. Mannagongdirnar skulu í minsta lagi lýsa:

- hvat mál virkið hevur sett fyri at minka um útlát á sjógv og til luft, nøgd av burturkasti o.a.,
- hvussu og hvussu ofta málini verða mátað og endurskoðað,
- stýring av virkseminum,

- kanningar av útláti og viðlíkahald av reinsiskipanum,

- skrásetingar,
- skrásetingar av frávikum,
- fyribyrging av óhappum,
- upplæring av starvsfólkum, sum hava ábyrgd av at fylgja mannagondunum.

6.5.3 Umhvørvisstýrisskipanini og tilhoyrandi mannagongd skulu til ein og hvørja tíð kunna síggjast av Umhvørvisstovuni eftir umbøn.

6.5.4 Um umhvørvisstýrisskipanin ikki er góðkend av óheftum stovni, skal P/F Marine Harvest hava serstakan skoðanarbólk, sum eftirmetir umhvørvisstýrisskipanina einaferð um árið.

6.5.5 Umhvørvisstovan skal hava avrit av árligu eftirmetingini av skipanini og áseting av nýggjum umhvørvismálum í seinasta lagi 1.apríl á hvørjum ári.

6.5.6 Allar kanningar skulu gerast meðan virksemið er ígongd.

6.5.7 Marine Harvest skal skrivliga eftirmeta øll eftirlit og allar kanningar.

6.5.8 Um kanning ella frágreiðing vísir, at P/F Marine Harvest ikki heldur treytirnar í hesi góðkenning, skal Umhvørvisstovan í seinasta lagi eina viku eftir, hava avrit av kanning ella frágreiðing, saman við eini ætlan við bøtandi atgerðum.

## 6.6 Rakstarskráseting/Umhvørvisfrágreiðing.

6.6.1 Fyri hvørt ár skal P/F Marine Harvest skráseta hesar upplýsingar:

- Tal og stødd av framleiddum smolt
- Tal og stødd av deyðum smolt
- Fóðurnýtsla
- Fóðurfaktor
- Nøgd og slag av brúktum heilivági og kemikalium
- Nøgd av burturkasti, tilskilað slag og hvønn tað er latið til.
- Rakstrartrupulleikar/óhapp sum hava umhvørvisligan týdning.
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi.

6.6.2 Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum, og skulu goymast í minsta lagi 5 ár.

## 6.7 Óhapp

6.7.1 Um dálking kemur fyri vegna óhapp[3] skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til at avmarka avleiðingarnar.

[3] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

6.7.2 Óhapp, sum hava ella kunnu hava umhvørvisligan týdning, skulu skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk v.m. sendast Umhvørvisstovuni.

6.7.3 Har vandi er fyri spilli av kemikalium, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

## 6.8 Burturkast

6.8.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[4], og skal latast til góðkendan móttakara.

6.8.2 Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egnað til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

6.8.3 Burturkast skal regluliga latast góðkendum móttakara, soleiðis at goymslurnar ikki gerast ov stórar.

## 6.9 Óljóð

6.9.1 Ískoytið til óljóð[5] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)

| | **mán – frí kl. 07 – 18 leyg. Kl. 07 - 14** | **mán – frí kl. 18 – 22 leyg. kl. 14 – 22 sunnu- og halgidagar kl. 07 - 22** | **Allar dagar kl. 22 - 07** |
|---|---|---|---|
| **Økið 1: Vinnuøkið, har larmandi virksemi kann fara fram** | 70 dB | 70 dB | 70 dB |
| **Økið 2: Vinnuøkið, har minni larmandi virksemi kann fara fram** | 60 dB | 60 dB | 60 dB |
| **Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki** | 55 dB | 45 dB | 40 dB |
| **Øki 4: Bústaðarøki** | 45 dB | 40 dB | 35 dB |

*Markvirðini, sum eru sett í talvu 1, vísa, at um ein er staddur í t.d. økið 4, sum er bústaðarøki, millum kl. 22 - 07, er mest loyvda óljóð frá virkseminum 35 dB.*

5.9.2 Um ampar verða av óljóði frá virkseminum, kann Umhvørvisstovan krevja óljóðsmátingar gjørdar, tó í mesta lagi einaferð um árið.

5.9 3 Um ampar verða av ljósum frá alivirkseminum, skulu neyðug tiltøk gerast.

---

[4] Kunngerð nr. 147 frá 19. okt. 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. sept. 2007

[5] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

## 7. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.
Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Avrit:**

Fuglafjarðar kommuna, Ennivegur 38, FO 530 Fuglafjørður
Heilsufrøðiliga starvsstovan, Smyrilsvegur 7, 2. hædd
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn.